Viðgerðarstovnur í Íslandi:

Alkoholisma er ein sjúka

– um sjúklingurin góðtekur hetta, so eru útlit til, at hann fær hjálp.

– Hetta sigur Hendrik Berndsen, formaður SÁÁ (felagið fyri alkoholistar) í Íslandi. Í roynd og veru er viðgerðin, at byggja persónleikan hjá einstaklinginum upp aftur, sum er niðurbrotin av rúsdrekkamisnýtslu í stytri ella longri tíðarskeið. Úrslitini hjá íslendingum eru so mikið góð, at hini Norðurlond nú hava fingið áhuga fyri at royna hesa viðgerð.

orð og myndir
Dagny Joensen

Eftir bert átta árum, hevur tað eydnast íslendingum at byggja upp heilsustovn, sum bert hevur eitt endamál, – nevniliga, at hjálpa fólki úr rúsdrekkamisnýtslu. Antabusviðgerð verður ikki nýtt í Íslandi, og har kenna teir als ikki til hesa viðgerð.

Fyri níggju árum síðan gjørdu íslendingar av at gera eitthvørt tiltak fyri at basa rúsdrekkamisnýtsluni, sum har eins og í øðrum londum hevur havt stórt árin á fólkaheilsuna.


Alkoholistar – eini átta í tali, vórðu sendir á Freeport viðgerðarheim í USA, sum bert tekur sær av alkoholistum. Ein teirra, sum var við á ferðini, er Hendrik Berndsen. Hann hevði frammanundan orsakað av alkoholismu, verið á psykiatriskum deildum í Íslandi í eitt 10 ár skeið, men tað hevði ongan bata við sær. Hann datt úti aftur beinanvegin hann slapp útaftur.

Ongar tablettir


Freeport skipanin, sum í Íslandi verður nevnd SÁÁ (felagið fyri alkoholistar», er av serligum slag. Viðgerðin er ikki at geva tablettir, men heldur, at byggja persónin upp aftur, sum er niðurundirkomin av brennivíni í longri ella styttri tíðarskeið.

Viðgerðin er á henda hátt ein samrøðuterapi, sum skal fáa sjúklingin at viðganga, at hann er sjúkur. Sjúkan verður eins og hjá sukursjúkusjúklingum, sum ikki tola sukur, sammett við alkoholistar, sum ikki tola brennivín.

– Kunnu vit fáa alkoholistar at góðtaka hetta, so er møguleiki fyri, at hann verður lektur, sigur Hendrik Berndsen, sum umboð Sosialins hitti í Íslandi í juni mánaða.



SÁÁ felagsskapurin bygdi hetta sjúkrahúsið í fjor. Tað kostaði 75 mill. íslendskar krónur, – góðar 35 mill. Alt byggiarbeiðið varð gjort ókeypis. Av tí at alkoholisma verður mett sum ábrar sjúkur, rindar sjúkrakassin fyri innleggingarnar. Vit fingu ikki loyvi at avmynda umhvørvið innanhýsis, men nevnast kann, at tað var lístarliga frágingið. M. a. hava nógu listafólk verið í viðgerð, og hesi hava prýtt stovnin ókeypis. Tað var av sonnum sum at ganga í einum lístaskála, tá tú vitjar har



Hendrik Berndsen, formaður í SÁÁ, er besta dømi um, at tað ber til at sleppa undan rúsdrekkanýtslu. Hann sigur sjálvur, at samfelagið hevði givið upp royndirnar at fáa hann vandan av við rúsdrekka. Hann misti alt, handilsfyritoku konu, børn og heim, og hevði bert gotuna eftir. Í dag hevur Hendrik endurstovnað handilsfyritokuna og er nú saman við konu og børnum, umframt abbabørnum. Tey búgva í einum stórum sethúsum í Reykjavík og hava tað gott. Sjálvur hevur Hendrik Berndsen úr at gera við SÁÁ og nýtir alla arbeiðsorkuna ókeypis har. Í fyritokuni hevur hann góð starvsfólk, sum reka handilin

Starvsfólkið eru alkoholistar

Fyri at prógva góða úrslitið, og eisini fyri at føroyingar kunnu fáa vitan um hesa alkoholviðgerð, fóru vit á ferð kring um á ymsu stovnunum, sum nú eru í Íslandi.

SÁÁ er ein sjálveigandi stovnur, har nevndin arbeiðir ókeypis. Nevndin er samansett av fólki, sum øll hava fingið viðgerð. Tey eru alkoholistar, og ikki sum vit vildu nevnt teir, – fyrrverandi alkoholistar.

– Hevur tú einaferð verið alkoholistur, so hevur tú sjúkuna. Viðgongur tú hetta, kanst tú gera tær vónir um at fáa eitt sámiligt liv, sigur Hendrik Berndsen.

Stovnurin hevur eitt viðtalurúm í Reykjavík, har fólk altið kunnu koma, at leita sær hjálp. Hetta er samstundis fyrisitingarhús og viðgerðarhús, har børn og familja at alkoholistum kunnu koma á serligt skeið og viðtalur, íð skulu stúdla teimum í at taka væl ímóti alkoholistinum, tá hann kemur heimaftur eftir viðgerð.

Annars er eitt sjúkrahús við pláss fyri 60 sjúklingum (á biðlista eru 200). Hetta verður nevnt aveitrandi viðgerð, har sjúklingurin kann vera frá 10 døgum til ein mánaða, – alt eftir hvussu niðurundirkomin hann er av brennivíni.

Á sjúkrahúsinum eru triggir læknar, fýra sjúkrasystrar og 12 hjálparfólk av ymsum slag, tilsamans 29 fólk. Hesi eru øll alkoholistar, sum hava fingið heilsubót. SÁÁ metir, at fólk, sum hava verið rúsdrekkamisnýtarar, á besta hátt kunnu stúdla og hjálpa sjúklingunum, tá tey eru eitt livandi prógv fyri, at heilsubót fæst.

Í náttklæði

Dagurin gongur við bólkaarbeiði, samrøðuterapi o.a. virksemi, – tó soleiðis, at alkoholisturin hesar fyrstu dagarnar ikki fær stundir at hugsa so nógv um støðu sína.

Allir sjúklingarnir verða koyrdir í náttklæði og morgunkápu. Teir kunnu á henda hátt ikki so skjótt broyta hugsan, um teir vilja sleppa úr viðgerð.

Er tað kortini onkur, sum vil sleppa heimaftur, tekur tað so drúgva tíð at fáa fatur í klæðir o.a. viðferi, at starvsfólkið sum oftast fær tosa sjúklingin til rættis, íðrenn tað kemur so langt. Felags fyri alt, sum viðgerðin á sjúkrahúsinum fevnir um, er, at sjúklingurin ger tað av egnum vilja. Talan er ikki um at noyða sjúklingin til nakað, sum er ímóti vilja hansara.

Tá aveitranin er av, verður sjúklingurin koyrdur á hvíldarheim, har hann skal gjøgnum ávisa viðgerðarskrá í 28 dagar. Her verður hann gjørdur varugur við, hvussu hann skal fóta sær, tá hann kemur út aftur. Hann fær serliga viðgerð fyri at byggja persónleikan upp aftur, sum í flestu førum hjá alkoholikarum er so niðurbrotin, at hann als ikki hevur virðing fyri sær sjálvum. Stutt sagt, vit læra alkoholistin at hava virðing fyri sær sjálvum og menniskjum sínum, so hann á jøvnum føti við hinum samfelagsborgarunum, kann virka aftur í gerandisdegnum. Viðvikjandi royndunum at fáa arbeiði og eitt stað at búgva, um familjan ikki er saman longur, so skal alkoholisturin sjálvur syrgja fyri hesum. SÁÁ stúdlar bert sjúklingin til at royna seg sjálvan. Vit kunnu ikki vera hjálparar alt livið, men bert fyri eitt tíðarskeið, tí annars vil hann ongantíð megna at 'va eitt vanligt liv aftur.

Umframt sjálvt viðgerðartíðina, so fær sjúklingurin møguleika at hittast við øðrum alkoholikarum, sum eru lektir, á fundi, íð er hvønn dag í viku. Her verður gjørt ymiskt felagsstriv og møguleiki er at tosa við hvønn annan, at vita hvussu einstaklingurin megnar at koma í vanligt umhvørvi aftur.



Fyrisitingarhúsið hjá SÁÁ er samstundis viðgerðarsrstovnur, har familjur hjá alkoholikarum kunnu leita sær hjálp og stuðul. Í niðaru hædd eru handlar, sum hava leigað sær holi. Leiguinntokurnar fara til arbeiðið innan SÁÁ

190 fundir um dagin

– Fyri átta árum síðan vóru triggir slíkir fundir um vikuna í Reykjavík. Í dag eru 190 fundir um dagin – kring um í Íslandi. Á slíkum fundum nýtast bert at vera frá tveimum sjúklingum og upp eftir, – alt eftir hvussu nógvir alkoholistar eru á ymsu plássunum.

Viðvikjandi heilsubót, og hvussu henda viðgerðin virkar, sigur Hendrik Berndsen, at tað hava teir fullgott prógv fyri. Vit hava sent spurnarbløð út eftir fimm ára skeið. Tá vísti tað seg, at av 7.000 viðgerðum, svaraðu 3.500 at tey ikki høvdu drukkið brennivín síðan viðgerðina. Annar bólkur vóru tey, sum høvdu drukkið einaferð aftur, men vóru komin fyri seg, og tríðji bólkur svaraði ikki. Her metir SÁÁ, at tey annaðhvørt ikki høvdu svarað ella at tey vóru byrjað aftur at drekka.

Vit tosaðu við ein lækna á sjúkrahúsinum. Hann var eisini alkoholistur. Hevði ætlað sær útbúgvingu sum skurðlækni, men rakk ikki málið, orsakað av rúsdrekkamisnýtslu. Hann starvast nú á sjúkrahúsinum, har hann granskar í sjúkuni, hvi nøkur menniskju gerast bundin av rúsdrekka, meðan onnur kunnu liva við hesum alt livið, uttan at tað nervar tey í gerandisdegnum.

Brynjálvur, lækni sigur: – tað er nógv sum bendir á, at alkoholisma er ein sjúka, at heilin hjá summum menniskjum tørvar eitt evni, sum onnur menniskju hava.

Tað vil siga, at tá hesi fólk byrja at drekka brennivín, kemur brek í heilan, sum broytir persónleika teirra. Dømi um, at børn hjá alkoholikarum eisini gerast bundin av rúsdrekka sigst ofta vera, tí hesi eru von við rúsdrekka frá barnsbeini av. Tað eri eg ikki so visur í. Heldur er tað arvaligt líkamligt brek, sum ger, at børnini eisini gerast alkoholikarar.


Hóast Freeport skipanin ikki er kend í hinum Norðurlondum, so er kortini útlit til, at SÁÁ í Íslandi til heystar fer undir at skipa fyri tiltokum, har norðurlendingar eisini sleppa við.

Talan er um at skipa skeið og viðgerð, sum í flestu førum er samróða og fyrilestrarterapi á donskum, svenskum og norskum máli.


– Orsøkin til hetta er, at vit fáa so nógvar fyrispurningar. Sum nú er ber illa til at taka útlendsku grannar okkara við, tí teir ikki skilja okkara mál, sigur Hendrik Berndsen.

Dømi um útlendsku sjúklingarnar eru eitt nú flogfeløg, sum ístaðin at koyra flogskiparar úr starvi, íð eru vorðnir alkoholistar, velja feløgini heldur, at senda teir til okkara, tí tað kostar so nógv at veita flogskiparum endurgjald, um teir skulu koyrast í ótíð.

At enda sigur Hendrik Berndsen við Sosialin, at teir eisini hava havt einstakar føroyingar á sjúkrahúsinum. Hann skoytir uppi, at tað er av týdningi, at Norðurlond standa saman og stúdla hvørt annað í hesum máli, og at hetta kann koma einstøku londunum tilgóðar seinni. Eins og vit hava bygt upp slíkan viðgerðarstovn, eftir at vit fóru út at leita okkum heilsubót, soleiðis er eisini hugsandi, at føroyingar, norðmenn, sviar og danir kunnu gera somuleiðis.



Alan Herzlin, yvirlækni á Freeport sjúkrahúsinum á Long Island, er kendur í Íslandi. Hann var tann, sum hjálpti alkoholikarum í Íslandi, sum leitaðu sær heilsubót. Tá rindaði landskassin fyri viðgerðina. Í dag er SÁÁ ein sjálveigandi stovnur, sum fær ókeypis arbeiðsmegi frá teimum, sum fingu hjálp har



Umleið tríði hvør sjúklingur, sum fær viðgerð fyri alkoholismu, fær heilsubót. Myndin er hvíldarheimið hjá SÁÁ í Ølfusi, har rúmd er fyri 30 sjúklingum.

FARVE